Handverkarin nr.6 21/03/03 21:35 Page 1 (Cyan plate)

# handVERKARIN

1. ÁRSFJÓRÐINGUR 2003 BLAÐ NR. 6 HAVNAR HANDVERKARAFELAG



Handverkarin nr.6 21/03/03 21:35 Page 2 (Black plate)

# Aðalfundir 26. mars á Hotel Hafnia

Ársaðalfundur felagsins verður mikudagin 26. mars kl. 19.30 á Hotel Hafnia.

## Skrá samb. § 25 í lógini:

1. Val av orðstýrara
2. Frágreiðing frá farna árinum
3. Roknskapur til góðkenningar
4. Innkomin mál/lógarbroytingar (Støðutakan til lívstrygging)
5. Val av nevnd
6. Val av tveimum grannskoðararum
7. Ymiskt

## Hálvan tíma aftaná ársaðalfund felagsins verður aðalfundur í Eftirlønargrunninum við hesi dagskrá:

A. Val av orðstýrara
B. Frágreiðing frá nevndini um virki grunnsins í farna ári
C. Framløga og góðkenning av roknskapi og fíggjarstøðu
D. Støða verður tikin til, hvat gerast skal við møguligt avlop ella hall
E. Val av nevndarlimum
F. Val av tveimum grannskoðarum
G. Møgulig mál frá nevnd/limum

## Í blaðnum hesu ferð:


| | síða |
|---|---|
| Aðalfundir 26. mars á Hotel Hafnia | 2 |
| Felagið keypt ongina Sjúrðargøta 20 | 3 |
| Bárður Klakstein fekk heiðursgávu fyri gott avrik | 4 |
| Eirikur Ó. Simonsen: Sveinaroyndin endavend | 5 |
| Petur Midjord: Fakliga røkin hegnismaður | 6 |
| Óli Jacobsen: Hvat kunnu fakfeløg samstarva um? | 7 |
| Brot úr søgu felagsins | 20 |
| Knappliga 1000 lærlingar tíðarskeiðið 1998-2002 | 30 |



**Útgevari:** Havnar Handverkarafelag · Tróndargøta 16 · Box 203 · 110 Tórshavn
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Eli Brimsvík
**Blaðstjórn:** Snæbjørn í Dali · **Layout, umbróting og prent:** Pf. Einars Prent
Havnar Handverkarafelag gevur Handverkaran út 4 ferðir um árið.
Evstamark til komandi blað er 1. mai 2003 · **Blaðið er prentað: 21. mars 2003**
**Avgreiðsla:** Yrkadagar frá kl. 9 til 12 · Hósdag er eisini avgreiðsla frá kl. 15 til 18.
Telefon 31 15 48 · fax: 31 95 48 · teldupostur: hhvf@post.olivant.fo.

# Felagið keypt ognina Sjúrðargøta 20






Havnar Handverkarafelag hevur keypt ognina Sjúrðargøta 20 frá Havnar Handverksmeistarafelag, og flytur ætlandi inn 1. apríl komandi.

Húsini eru í sera góður standi, tey eru nýliga høvuðsumvæld, – men húsini eru eisini søgulig.

Húsini eru helst bygd í 1922, og vit vita, at 8. september 1922 keypir Schønning Andresen húsini. Hann var – um tað mundi – adventistaprestur í Føroyum. Adventistarnir høvdu møtisal við prædikastóli í kjallaranum. Á myndini høgrumegin, sum helst er tikin í 1925, síggja vit, at tað hevur staðið „Bethel“ omanfyri hornahurðina. Hin myndin er tikin um sama mundi. Á henni síggja vit Schønning Andresen, adventistaprest, við prædikastólin í kjallaranum.

Adventistarnir seldu húsini í 1932 til katólska prestin Engelbert Bockenoogen, og í 1934 yvirtekur ein sjálvsognarstovnur, nevndur Sct. Maria Stiftelsen, húsini. Vit hava frætt, at katolikkarnir áttu húsini til 1971.

Seinni hava Egil Hammer og Havnar Handverksmeistarafelag átt húsini.

Húsini standa á horninum Tvørgøta – Sjúrðargøta.

***Bárður Klakkstein, bilmekanikari:***

# Bárður fekk heiðursgávu fyri gott avrik

Bárður Klakkstein er 26 ára gamal, hann er føddur og uppvaksin í Klaksvík.

16. juni 1999 fór Bárður í bilmekanikaralæru hjá Shell Quick Service í Klaksvík, og varð útlærdur bilmekanikari 14. februar í ár. Bárður arbeiðir nú sum sveinur hjá Autoshine í Klaksvík.



Vit hava hitt Bárð, og spurdu hann fyrst, hví hann í 1999 valdi at fara í bilmekanikara-læru, og Bárður svarar soleiðis: „Havi altíð haft stóran ahuga í bilum og teknikki sum heild. So at fara í læru sum bilmekanikari var heilt náttúrligt fyri meg. Bilar eru í dag á einum sera høgum tekniskum støði, bæði mekaniskt og elektriskt.

Tá vit spyrja Bárð um læruplássið sigur hann, at hann fór í læru hjá Shell. „Har fekk eg bjóðað lærupláss, eftir at eg var givin á øðrum verkstað. Eg fekk góð kor hjá Shell. Eigarin seldi síðani Shellstøðina, og Autoshine v/Jan Joensen leigaði síðani verkstaðið, og eg helt fram við læruni hjá Autoshine. Og eg má siga, at eg lærdi sera nógv á verkstaðnum, meðan eg var í læru."

Vit spurdu eisini Bárð, um hann var nøgdur við útbúgvingina/undirvísingina, hann fekk á Tekniska skúla í Havn.

Og hann letur væl at skúlanum: „Skúlin hevur havt ógvuliga nógv at siga í útbúgvingini. Nógv av tí tú lærur í skúlanum, eru ikki tíð og umstøður til at læra á einum lærupláss.

Undirvísingin var góð á skúlanum. Tað kann eg siga, nú eg eri liðugur við útbúgvingina. Tá ein er í skúla, hugsar ein mangan: Hvat skal eg brúka hetta til? Men tá tað kemur til endaligu royndina, er ongin ivi. Tá sær man, at man hevur brúk fyri øllum, sum man hevur lært, og tá er gott at hava fylgt við."

Vit spurdu eisini Bárð, hvat hann heldur hevur stórstan týdning á arbeiðsplássinum, tá man er lærlingur.

*… framhald á síðu 24*

# Sveinaroyndin endavend



## *Eirikur Ó. Simonsen, leiðandi lærari á Tekniska skúla:*

# Sveinaroyndin endavend

Eirikur Ó. Simonsen fór í 1968 í læru hjá Frits Jensen í Gundadali í Havn, og varð útlærdur bilmekanikari á sumri 1972. Árið eftir fór hann á maskinmeistaraskúla og tók maskinmeistaraprógv í 1975.

Í september 1978 byrjaði Eirikur at undirvísa á Tekniska skúla í Havn, og varð settur í fast lærarastarv 1. januar 1979. Eirikur Ó. Simonsen er í dag leiðandi lærari á bildeildini.



Arbeiðið hjá einum bilmekanikara er nógv broytt seinnu árini, og kann als ikki samanberast við tað, sum var mest vanligt fyri 10-20 árum síðani.

Broytingarnar á elektriska og elektroniska økinum hava verið ómetaliga stórar í mong ár, og tí eru eisini krøvini, sum verða sett einum bilmekanikara, munandi broytt.

Tekniski skúli í Havn hevur tí eisini hildið tað verið neyðugt at broyta og laga sveinaroyndirnar hjá bilmekanikarunum til nýggju tíðirnar. Og fyri stuttum varð – av somu orsøk – sveinaroyndin hjá bilmekanikarum munandi broytt.

Í mong ár hevur tað verið soleiðis, at tey, sum fóru til sveinaroynd, fingu eina ítøkiliga uppgávu t.d. at umvæla ein motor, róðurgreiðir ella bremsur.

### Lærlingurin skal sjálvur finna brekið

Nú er sveinaroyndin løgd soleiðis til rættis, at lærlingurin í størri mun sjálvur skal finna brekið og orsøkina til brekið. Til sveinaroyndina fær lærlingurin t.d. at vita, at bilurin dregur til høgru, og at bilurin ikki kraftar tað, hann eigur. Uppgávan hjá lærlinginum er tí eisini í størri mun at finna orsøkina og meta um, hvat skal gerast.

Hesar broytingarnar gera eisini, at lærlingurin til sveinaroyndina skal arbeiða meira sjálvstøðugt og vísa ella prógva sín førleika.

Í hesum sambandi eigur eisini at vera nevnt, at áðrenn lærlingarnir møta til sveinaroyndina, hava lærararnir broytt okkurt í bilinum, so alt ikki virkar, sum tað skal.

*… framhald á síðu 9*

***Petur Midjord, stjórnarlimur árini: 1950-1968***

# Fakliga røkin hegnismaður

Í søgu Havnar Handverkarafelags eru menn, sum hava havt serligan týdning fyri felagið. Her verður t.d. hugsað um menn, sum hava sitið í stjórn felagsins í drúgt áramál og menn, sum hava sitið við ábyrgd í ringum tíðum undir vána korum. Ein av hesum monnum er Petur Midjord.



Petur Midjord varð valdur í stjórn felagsins á stovnandi aðalfundinum í 1950, og sat við ábyrgd – uttan slit – í 18 ár. Hann var formaður felagsins tíðarskeiðið 20. februar 1959 til 14. februar 1968.

Petur Midjord varð føddur 17. september 1922 í Hovi. Hann var sonur Andreu Danielsen úr Þorkeri og Oliver Midjord úr Hovi. Tey áttu eisini synirnar Charles, ið doyði í besta ungdóms blóma og nýgiftur í Íslandi, og Jaspur Midjord, sum í fleiri ár hevur sitið í stjórn Havnar Handverkarafelags.

Pápi Petur Midjord var skipari, og tey fluttu á Tvøroyri, og seinni í Líðina við Trongisvágsfjørð, haðani skipaflotin sigldi út og inn.

## Dámdi betur heimbygdina

Men smádreinginum Petur dámdi betur heimbygdina og vaks tí mest upp hjá abbanum, Jaspuri, í Hovi. Barndómsminnini komu mangan fram fyri hann í manndómsárum og løgdu niður í hann fittan part av tí lívsførningi, sum seinni ríkaði lívsfatan hansara.

Klókt hegnisfólk kom av Miðgerði. Eisini tann greinin, ið flutti suður á Akrar. Langabbin, Dánjal Petur Midjord, hevði so gott innlit í samfelagsspurningar, at samtíðarfólk hansara íðiliga bóðu hann, hóast leikmann, leggja teim ráð í rættarspurningum og føra sakir fyri tey í tinginum.

Petur hevði frá ungum árum stóran hug til bókina, og slapp einans 15 ára gamal á Føroya Fólkaháskúla.

## Lærupláss hjá Jóhan Ziska í Havn

Pápin, Oliver, lovaði honum, at var næsti túrurin góður, so skuldi hann sleppa á Lærarskúla. Lærarskúlin var tá natúrligasta leiðin til bókliga út-

*… framhald á síðu 12*










# Øll kunnu keypa virðisbrøv

Mangir løkir smáir gera stórar áir, siga vit. Soleiðis er eisini við virðisbrøvum. Ganga fleiri saman um at gera íløgur, kunnu tey fáa teir fyrimunir, sum størri íleggjarar fáa. Íløguprógv kunnu keypast fyri smærri upphæddir – heilt niður í 1.000 krónur. Kaupthing hevur fleiri íløgufeløg at velja ímillum – t.d. feløgini »Norrøn partabrøv« og »Lánsbrøv í donskum krónum«.

KAUPTHING
Føroyar
Virðisbrævameklarafelag

Tinghúsvegur 14 • FO-110 Tórshavn • tel. 35 15 00 • fax 35 15 01 • www.kaupthing.fo

SANSIR TEL 355 355

Handverkarin nr.6 21/03/03 21:37 Page 9 (Black plate)



… framhald frá síðu 5

## Nýggj tøkni og telduútgerð

Lærlingarnir skulu eisini duga at brúka nýggjastu tøkni- og telduútgerð, testa og gera tað, man kundi nevnt "eina diagnosu".



Jónbjart Thomasen lærari

Stórur dentur verður nú eisini lagdur á skrivligt arbeiði. Lærlingarnir skulu gera eina skrivliga frágeiðing um tað arbeiði, teir hava gjørt í samband við sveinaroyndina.

Umleggingin av sveinaroyndini er kortini ikki gjørd eftir einum degi. Undirvísingin er í dag tillagað soleiðis, at lærlingarnir kunnu klára hesa nýggju sveinaroyndina. Og uppgávan hjá lærarunum er nú í størri mun, at teir skulu vera vegleiðarar hjá lærlingunum.

Henda umlegging av sveinaroyndini setur eisini stór krøv til skoðanarmeistararnar. Og tí er eisini neyðugt hjá skoðanarmeistarunum at fara á skeið fyri at seta seg inn í nýggju skipanina.

## Lærarar á bildeildini

Á bildeildini á Tekniska skúla í Havn eru 3 faklærarar í føstum

… framhald á síðu 16



Bergur Danielsen, lærari



Páll Arni Berg, lærari



*Á myndini eru nærum øll starvsfólkini í Tekniska Skúla í Havn.*

Handverkarin nr.6  21/03/03  21:37  Page 10    (Magenta plate)

# Lit-lýsingar

Handverkarin nr.6 21/03/03 21:37 Page 10 (Yellow plate)

# Lit-lýsingar

Handverkarin nr.6 21/03/03 21:37 Page 11 (Magenta plate)

# Lit-lýsingar

Handverkarin nr.6  21/03/03  21:37  Page 11    (Yellow plate)

# Lit-lýsingar

Handverkarin nr.6 21/03/03 21:37 Page 12 (Black plate)



… framhald frá síðu 6

búgving í Føroyum. Men so skuldi ikki vera. Túrurin var alt annað enn góður, og pápin fekk tí soninum læurpláss hjá Jóhan Ziska, snikkara í Havn. Hetta virkið datt niðurfyri, og hann mátti skifta lærupláss, og kom soleiðis í læru hjá Tórshavnar Skipasmiðju. Har lærdi hann til skipstimbrara og arbeiddi á Skipasmiðjuni, til hann í 1946 fór til Íslands at vinna sær pening.



*Lítli Petur og mamman Andrea avmyndaði í 1922.*

## Giftur við Monu Dam

Í 1943 giftist Petur við Monu Dam. Mona er dóttur Elina og Sigmund Dam við Norðskála. Tey bygdu í 1948 hús á Argjum og fingu børnini Eydnu, Sólrúna, Bjarka, Egin og Birnu. Eyðna er gift við Ingibjarti Durhuus, Sólrún er gift við Poul Michelsen, Bjarki er giftur við Bente, Egin er giftur við Jóhonnu, og Birna er gift við Óla Breckmann.

Heimafturkomin úr Íslandi fór Petur aftur í starv hjá Skipasmiðjuni. Har kom hann, undir og eftir seinna heimsbardaga, at vera við til at smíða nøkur av teimum fyrstu skipunum, sum bygd eru í Føroyum – í nýggjari tíð – t.d. Vón, Norðberg og Kúrberg.

## Stjórnarlimur 12. februar 1950

Í januar/februar mánaða 1950 vóru stig tikin til at stovna sjálvstøðugt yrkisfelag fyri handverkarar í Havn. Petur arbeiddi tá á Skipasmiðjuni og kom upp í arbeiðið at fyrireika stovnanina av Havnar Handverkarafelag.

Frammanundan høvdu handverkarar í Havn verið skipaðir í serstakari deild hjá Havnar Arbeiðsmannafelag.

Petur varð á stovnandi aðalfundi Havnar Handverkara-felags, 12. februar 1950, valdur í fyrstu stjórn felagsins.

## Serligan týdning fyri felagið

Petur Midjord sat við ábyrgd í stjórn felagsins – uttan slit – í 18 ár. Hann var formaður felagsins tíðarskeiðið 20. februar 1959 til 14. februar 1968.

Hetta vóru strævin rembingarár hjá monnum við bjørtum vónum og ætlanum, tá Føroyar skuldu laga seg til nýggjar avbjóðingar eftir tey á mangan hátt ónáttúrligu krígsárini.

Lat tað verða sagt, at Petur var fakliga røkin hegnismaður alt lívið. Samvitskufult legði hann sítt úr hondum, og tey, sum kendu Petur, mundu onkuntíð halda, at stundum tóktist samvitskan at vera ein forðan fyri vavinum á tí, sum kundi verið avrikað. Sjálvur dugdi hann kortini altíð at

síggja, hvat hevði størri týdning í longdini, og dugdi tí eisini at taka rættar avgerðir.

## Hóvsamur og jarðbundin

Hóast hart stóð á millum partarnar á arbeiðsmarknaðinum tey soltnu kreppuárini í 1950'unum, vann Petur virðing frá báðum pørtum, tí hann var so hóvsamur og jarðbundin í øllum lívsins viðurskiftum. Kendi markið millum har, tað bar og har, tað brast.

Dugdi tí eisini at taka uppaftur, tá tað ikki rakk, men stakk. Semingslyndi var eitt hansara fremsta eyðkenni. Av sonnum hentir og neyðugir eginleikar hjá hepnum fakfelagsleiðara.

Tá búskaparkreppan rakti í 1951 arbeiddi Petur hjá stóra danska byggifelagnum Kampsax, ið tá stóð fyri arbeiðinum at byggja út vestaru bryggju við Fiskasentralin í Havn.

## Byggifelagið Lamhauge og Waagstein

Í 1954 byrjaði hann lívsyrki sítt hjá byggifelagnum Lamhauge og Waagstein í Havn.

Tíðum verður í føðingardags- og minningargreinum lagdur dentur á andaligu lívsverk teirra, ið umtalað verða. Men skal talan vera um varðar, ið reistir eru av fólki og standa eftir tey, so munnu Petur og onnur starvsfólk hjá Lamhauge og Waagstein, eiga mong vala minnismerki kring landið. Nevnast kunnu hesi dømi: Studentaskúlin í Hoydølum, Landssjúkrahúsið, Vesturkirkjan, Katólska kirkjan, Saltsølan, Bacalao, umframt hópur av øðrum húsum, havnum, vegum, stovnum og øðrum anleggum.

Petur arbeiddi hjá Lamhauge og Waagstein í 37 ár, tey nógvu síðstu árini sum formaður, til hann fór frá vegna aldur 68 ára gamal.

Tá fekk hann rættuliga umstøður at dyrka bókligu áhugamál síni. Las tað, hann fekk hendur á. Serliga stóð hugurin til landsins viðurskifti og Føroya søgu. Hann tók eisini upp ættargransking og leitaði eftir slektum so langt aftur, sum slapst.



*Ungdómsmynd av Peturi og Monu við dóttrini Eydnu í 1947.*

## Framúr stórt atkvøðutal

Hóast hann átti lítið av tí lyndiseykenni, sum merkir politikkarar, nevniliga persónligt framsókni (hann heldur skýggjaði háva um seg sjálvan), varð hann í 1966 valdur í bygdaráðið fyri Tórshavnar uttanbíggja sókn, sum Argir,

*… framhald á síðu 31*

# Lit-lýsingar

# Lit-lýsingar

# Lit-lýsingar

# Lit-lýsingar

… framhald frá síðu 9



starvi og ein faklærari í tímalærarastarvi. Hesir lærarar hava allir handverksútbúgving sum bilsmiðir og maskinskúlaútbúgving.

Á bildeildini er eisini ein maður, sum tekur sær av øllum viðlíkahaldi av amboðum og allari útgerð, sum verður brúkt í undirvísingini.

Umframt hesar eru aðrir lærarar knýttir at bildeildini at geva frálæru í grundfakum t.d. føroyskt, enskt v.m.

Harumframt er eisini vert at nevna, at fyri at kunna undirvísa á Tekniska Skúla krevst sernámsfrøðilig útbúgving, áhaldandi eftirútbúgving og dagføring innan yrki.

## Lærugreinir hjá bilmekanikarunum

### 1. skúlaskeiðið:

Føroyskt
Enskt
Náttúrlærugreinir
Tilfarslæra
Framleiðsla – menning og tænasta
Fyrstahjálp og eldsløkking
Bensin- og dieselmotorar
Stýri- og róðurgreiðir
Hydrauliskar bremsur
Girskipanir
Elektriska kervi- og stýringsskipan
Karrossarí – tunnplátuarbeiði
Trýstluftbremsur
Vallærugreinir

### 2. skúlaskeiðið:

Enskt
Framleiðsla – menning og tænasta
Arbeiðsmarknaður
Umhvørvisvernd
Hydrauliskar bremsur
Elektriska kervi- og stýringsskipan
Vallærugreinir



### 3. skúlaskeiðið:

Tilfarslæra
Framleiðsla – menning og tænasta
Umhvørvisvernd
Bensin- og dieselmotorar

Girskipanir
Elektriska kervi- og stýringsskipan
Vallærugreinir



4. skúlaskeiðið:

Tilfarslæra
Framleiðsla – menning og tænasta
Søla og tænasta
Búskapur og rakstur
Bensinmotorar
Dieselmotorar
Vallærugreinir



5. skúlaskeiðið:

Framleiðsla – menning og tænasta
Søla og tænasta
Búskapur og rakstur

Stýri- og róðurgreiður?
Elektriska kervi- og stýringsskipan
Vallærugreinir



6. skúlaskeiðið:

Framleiðsla – menning og tænasta
Arbeiðsmarknaður
Elektróniska stýringsskipanin
Vallærugreinir

7. skúlaskeiðið:

Framleiðsla – menning og tænasta
Girskipanir
Motorstýringsskipanin
Útskiftan av límaðum rútum

8. skúlaskeiðið:

Bensin- og dieselmotorar
Stýri- og róðurgreiðir?
Hydrauliskar bremsur
Elektróniska stýringsskipanin
Hentleika- og trygdarskipanin
Vallærugreinir

# Lit-lýsingar

# Lit-lýsingar

Handverkarin nr.6  21/03/03  21:38  Page 19    (Magenta plate)

# Lit-lýsingar

# Lit-lýsingar

***Havnar Handverkarafelag varð stovnað 12. februar 1950***

# Brot úr søgu felagsins

Vit fara í hesum og komandi bløðum at hava nøkur brot úr søgu felagsins.

Her verður eisini hugsað um einstaklingar, sum hava havt serligan týdning fyri felagið.

Um stovningarfundin sigur gerðabók felagsins soleiðis:



*Helgi Øster fyrsti formaður felagsins.*

Sunnudagin tann 12. februar 1950 kl. 3 sp. var stovningarfundur hildin í „Losjuni“.

Fundurin var settur við 34 monnum, øll stjórnin við form. Alfred Hofgaard, næstfo. Peter Midjord, kassam., Carl Midjord skrivara, Helgi Øster og Dánjal Tausen var møtt.

Fundurin var lýstur sum stovningarfundur, allir limir úr „Handverkaradeildini“ vóru boðaðir í soljóðandi skrivi:

## Stovningarfundur!

„Viðtikið varð á aðalfundi 30. jan. h.á. at handverkarar í ‘Handverkaradeildini’ ganga saman í sjálvstøðugt felag, ið stovnað verður sunnudagin tann 12. febr. kl. 3 s.p.“

Formaðurin setti fundin, beyð so monnum vælkomnum.

Fyrv. skrivarin Carl Midjord las úr gerðabókini síðsta aðalfund í „Handverkaradeildini“.

Síðan greiddi formaðurin frá starvinum hesa seinastu tíðina, vísti aftur á tað, ið fór fram á fundinum í Tórshøll 19. desember 49, har bræv varð sent til Havnar Arbeiðsmannafelag við uppsøgn; tosaði um fundarviðtøkurnar frá aðalfundinum, um henda stovningarfund.

Dánjal Tausen var kosin sum fundarstjóri og mælti hann til hóvliga framferð.

Harnæst fór stovnanin fram, á tann hátt, at hvør maður fekk ein pappírslepa har hann setti navn sítt, ið síðan var flýggjað stjórnini í hendi til varðveitslu.

## Hesir menn – 32 í tali – mynda í fyrstu syftu felagið, sum stovnarar:

Carl Holm Carlsen
Kaj Christiansen

Ólavur Dalsgarð
Valbjørn Dalsgarð
Poul Danielsen
Dánjal H Davidsen
Louis Eystberg
Wenzel Hammer
Meinhard Fr. Hansen
Ove M. Hansen
Alfred Hofgård
Carl Midjord
Peter Midjord
Ásmund Mikkelsen
Finn Mortensen
John Moretensen
Ole Mortensen
Sonne L. Mørkøre
Flemming Niclasen
Eskild Nygård
Pauli Næs
Esmar Olsen
Hans D. Petersen
Holm Petersen
Ernst Reinert
Hallgrím Rein
Dánjal Tausen
Súni Thomsen
Olivar C. Thomsen
Martin Wilhelmsen
Hans C. Wilhelmsen
Helgi Øster

Bert eittans navn varð skotið upp fyri felagið „Havnar Handverkarafelag“ og var hetta góðtikið við 32 atkvøðum. Stjórnarvalið fór fram á vanligan hátt.

## Til formann vóru uppskotini tvey:

Alfred Hofgaard 8 atkvøður. Helgi Øster 24 atkvøður.

Til kassameistara var Carl Midjord valdur við 30 atkvøðum.

## Stjórnarvalevnini vóru 7, og fall valið:

Hallgrímur Rein 21 atkv. Alfred Hofgård 15 atkv., Petur Midjord 13 atkv., Kaj Christiansen 19 atkv. Wenzel Hammer 9 stkv., Sonne Mørkøre 6 atkv. Dánjal Tausen 6 atkv. Mourits Mortensen, ið ikki var uppskotin fekk 2 atkv.

Hallgrím Rein, Alfred Hofgård og Petur Midjord vóru soleiðis valdir í stjórn.

Kaj Christiansen og Wenzel Hammer verða tiltaksmenn.



*Alfred Hofgaard f. 29. mars 1912 var formaður í Handverkaradeildini, tíðarskeiðið 1947-1950, áðrenn Havnar Handverkarafelag varð stovnað, og varð valdur í stjórn felagsins á stovningarfundinum.*

## Til roknskapargrannskoðara vórðu valdir:

Sigfred Skåle 25 atkv., Ólavur Dalsgarð 24 atkv.

Lógarbroytingaruppskotið, ið lá fyri til deildaraðalfundin, men tá bleiv útsett, kom nú fyri, bleiv nú lisið upp petti fyri petti, grein um grein; einstakar smærri rættingar vórðu gjørdar til tess, at hon varð góðtikin av fundinum við 15 atkvøðum.

Samtykt varð, at lønirnar fyri

… framhald á síðu 26

# Lit-lýsingar

# Lit-lýsingar

# Lit-lýsingar

# Lit-lýsingar

Handverkarin nr.6  21/03/03  21:38  Page 24   (Cyan plate)

Handverkarin nr.6  21/03/03  21:38  Page 24    (Magenta plate)

Handverkarin nr.6 21/03/03 21:38 Page 24 (Black plate)



*… framhald frá síðu 4*

Og hann sigur tá, at tað er, at lærumeistarin/eigarin gevur sær stundir at læra lærliningin so nógv sum møguligt, og ikki bara setur lærlingar at gera rutinu arbeiði. Og tá man er sveinur, haldi eg, at ordan, trivnaður og trygd á arbeiðsplássinum hevur sera stóran týdning.

Mangan verður tosað um, hvørjir eginleikar eru mest umráðandi hjá einum handverkara, og vit spurdu hann tí hvørjar eginleikar, hann heldur eru mest umráðandi hjá einum bilmekanikara.

„At kunna arbeiða sjálvstøðugt og vera væl fyri innan tað elektriska. Her er tað, at eftirútbúgvingin hevur ein stóran part at siga.

Tað skuldi verið krav, at bilmekanikarar skuldu til eftirútbúgving, – tann tekniska menningin innan bilar gongur í dag sera skjótt."

At enda spurdu vit Bárð, um hann hevur hugsað um, at evni, sum bilmekanikarar brúka, ella koma í samband við, kunnu vera heilsuskaðilig. Og tá svarar hann soleiðis: Á bildeildini í tekniska skúla høvdu vit skeið í vandamiklum evnum. Men hetta skeiðið lá í tí triðja ella næst síðsta skeiðnum. Hetta skeiðið skuldi verið hildið nógv fyrr í skúlagongdini. Evnini, sum bilmekanikara verða settir út fyri, eru mong og vandamikil. Eitt nú rútalím og ymiskar oljur. Serliga spillolja dálkar klæðini. Og aktivatorar, lím til dekkbøtingar og onnur upploysingarevni, sum verða brúkt til mangt og hvat á einum bilverkstaði.

At enda eigur at verða nevnt, at Bárður hevur rokkið sera góð úrslit á Tekniska skúla í Havn. Til sveinaroyndina var úrslitið so mikið gott, at hann fekk handaða heiðursgávu.



*Hesir vóru teir fyrstu bilmekanikaralærlingarnir, sum í februar fóru til sveinaroynd eftir tí nýggju skipanini.*

*Frá vinstru: Hallur Petersen frá Reyni Service í Hoyvík, Poul Arni Poulsen frá VR Bilum í Havn, Thorgrím Jacobsen frá ENM í Leirvík, Bárður Klakstein frá Autoshine í Klaksvík og Bárður Olsen frá P/F Wenzel í Havn.*

Handverkarin nr.6 21/03/03 21:38 Page 25 (Cyan plate)







**AGA** **Føroyar - Føroya Gassøla**

*- vit hava sølustøð kring landið*







# AGA Føroyar - Føroya Gassøla

*- vit hava sølustøð kring landið*






Salong
tōta

tel. 31 30 50
Magnus Heinasonargøta 19

**AGA Føroyar - Føroya Gassøla**

*- vit hava sølustøð kring landið*








- **Ídnaðargass:** Skeri- og sveisiamboð
- **Húsarhaldsgass:** Gassapparat, komfýrar, hitaovnar, gassgrýtur
- **Campinggass:** Kókibluss, hitaovnar
- **Gassbrennarir:** Til sveising av takpappi, lodding, svíðing

*- vit hava sølustøð kring landið*

Akranesgøta 2 · Postrúm 1088 · FO-110 Tórshavn
tel 315544 · fax 311706
e-mail: gassola@post.olivant.fo

Handverkarin nr.6 21/03/03 21:39 Page 26 (Yellow plate)

Handverkarin nr.6 21/03/03 21:39 Page 26 (Black plate)



… framhald frá síðu 21

álitisstørv framvegis vóru tær somu. Kassameistari 200,- kr. um mánaðin. Formaður 500,- kr. árliga og ókeypis telefon. Teir tríggir stjórnarlimirnir 400,- kr. um árið hvør.

Fundarstjórin gav síðan orðið leyst.

Alfred Hofgård tosaði um sáttmála við Havnar Handverksmeistarafelag, hann helt hetta var eitt tað fyrsta, ið átti at fáast í lag.

Holm Petersen eggjaði stjórnini til at fara hagfast til verka, og álegði hann henni, nú felagið var veruleiki, at nú mátti onki himpr og skrinkl verða.

Formaðurin mælti limunum at fylkjast um felagið soleiðis, at hvør einstakur eftir førimuni veitti stjórn og felagi allan stuðul til ein fullfíggjaðan felagsskap.

Fundurin slitin kl. 7.10 s.p.

Undirskrivað

Helgi Øster, H. Rein, C. Midjord,
P. Midjord, A. Hofgård.



*Carl Andreas Holm Carlsen f. 6. juli 1909 – d. 8. august 1972. Carl Andreas er tann, sum í gerðabókini er fyrst nevndur í yvirlitinum yvir teir, sum stovnaðu felagið (sí síðu 20). Hann var formaður felagsins tíðarskeiðini 1958-59 og 1968-1971.*



Handverkarin nr.6  21/03/03  21:40  Page 27     (Magenta plate)

Handverkarin nr.6 21/03/03 21:40 Page 27 (Black plate)



… framhald frá síðu 7

Tað, at vit ikki hava eitt felags LO, nýtist ikki at vera nøkur vanlukka. Í hvussu er tey stóru feløgini hava hvørt sær ment tær funktiónir, sum annars skuldu havt verið lagdar undir eitt LO. Hetta kann eisini vera ein fyrimunur, tí tá veit ein og hvør, hvat hvørt felag stendur fyri. Og eru sjónarmiðini nóg væl undirbygd, skuldi eisini verið møguleiki at fingið sítt ígjøgnum.

Javnan hevur verið gjørdur ein felags frontur móti tí almenna. Tað, at hetta eisini kann vera neyðugt, er í veruleikanum eitt falliterklering hjá allari skipanini. Í einum skipaðum samfelag skuldi støðugt verið ein dialogur millum fakfeløg og myndugleikar, so tað slapst undan slíkum konfrontatiónum. Júst eitt slíkt samskifti skuldi kunnað ment eina demokratiska tilgongd, sum avgjørt ikki er nøkur sjálvfylgja. Tað skal sigast, at her er tað ikki feløgini, tað stendur á, men heldur myndugleikarnir, sum í stóran mun sýna ein „vi alene vide“ hugburð. Ofta tykist hugburðurin at vera, at hvat enn verður gjørt, so skal – í hvussu er – ikki lurtast eftir t.d. fakfeløgum.



Olaf Johansen, skrivstovumaður hjá Føroya Fiskimannafelag.



Hans Jacob Joensen, skrivstovumaður hjá Føroya Fiskimannafelag.

Stutt um FF: Felagið er stovnað í 1911, og vit rokna limatalið at liggja um 2.500. Fiskimenn eru beinleiðis limir í felagnum. T.v.s. at vit eru ikki eitt meginfelag. Men vit hava álitismenn í hvørji sókn.

Felagið gevur út FF-blaðið, sum kemur út 2.hvørja viku við fiskivinnu- og felagstíðindum. Vit hava eisini fastar tættir við siðsøguligum tilfari eins og samfelagsviðurskifti verða viðgjørd óheft av politiskum áhugamálum. Vit meta blaðið vera ein serlig styrki hjá felagnum.

Heimasíða felagsins er: www.fiskimannafelag.fo




**BIRGIR KROSSTEIG**
*Múrarameistari*
*Jónas Broncksgøta 33A*
Tel 310696 • Fartel 210696 • Fax 321896

Handverkarin nr.6  21/03/03  21:42  Page 28     (Magenta plate)




Eykalutir

ama

BIRGIR KROSSTEIG
Múrarameistari
Jónas Broncksgøta 33A
Tel 310696 • Fartel 210696 • Fax 321896




Eykalutir

ama

**BIRGIR KROSSTEIG**
*Múrarameistari*
*Jónas Broncksgøta 33A*
Tel 310696 • Fartel 210696 • Fax 321896

# LIANA 1,3 & 1,6

*Prísir úr 145.000,-*



Pf. Einars Prent · 314929

**Spf. Eyðbjørn Hansen**

**Bilasøla og verkstaður · Tórshavn**

Telefon: 313375 · Fartelefon: 213375

www.suzuki.fo

- til flest allar bilar!

Landsins størsta
goymsla av
eykalutum til bilar

Postboks 3061
Fo-110 Tórshavn,
tel 31 3816

BIRGIR KROSSTEIG

Handverkarin nr.6 21/03/03 21:46 Page 29 (Cyan plate)



---

*- allar umvælingar
verða gjørdar,
bæði innan- og uttandura!*







- allar umvælingar
verða gjørdar,
bæði innan- og uttandura!







*- allar umvælingar*
*verða gjørdar,*
*bæði innan- og uttandura!*







**RÚNI SØRENSEN**
**Snikkarameistari**
**✆ 31 27 00 • 21 27 00**



team85



Sól & Klipp

Smyrilsvegur 6
Tel 31 25 11

Garðsgata 11
Tel 31 50 69

# Knappliga 1000 lærlingar tíðarskeiðið 1998-2002

Seinastu 5 árini eru knappliga 1000 handverkslærusáttmálar góðkendir í Føroyum.

Við øðrum orðum eru tilsamans umleið 1000 føroyskir ungdómar farnir í handverkslæru í Føroyum seinastu 5 árini.

Í yvirlitinum høgrumegin eru bara tær handverksgreinir, sum tíðarskeiðið 1998-2002 høvdu í minsta lagi 5 góðkendar lærusáttmálar.

Av somu orsøk eru t.d. gartnarar, optikarar og plastbátasmiðir ikki við í yvirlitinum, hóast lærusáttmálar vóru gjørdir.

Seta vit handverksgreinirnar í mun til, hvussu nógvir lærusáttmálar eru góðkendir 1998-2002 verður úrslitið hetta:

Nr. 1 Maskinsmiðir 211
Nr. 2 Timburmenn 163
Nr. 3 Elektrikarar 119
Nr. 4 Hárfríðkarar 63
Nr. 5 Bilmekanikarar 59
Nr. 6 Bygningssnikkarar 51
Nr. 7 Bakarar 42
Nr. 8 Rørsmiðir 19
Nr. 9 Kokkar 13
Nr. 10 Kondittarar 13
Nr. 11 Tænarar 13

Í tíðarskeiðnum 1998-2001 er lærlingatalið vaksandi frá 142 í 1998 til 230 í 2001.

Lærlingatalið er hinvegin fallið, frá 230 í 2001 til 213 í 2002.

Og hóast mong spáa at lærlingatalið verður uppaftur minnið í 2003, benda tølini fyri januar og februar í ár á at 2003 helst verður nýtt metár. Frá 1. Januar 2003 til 1. Mars 2003 vóru tilsamans 50 lærusáttmálar góðkendir.

| | 1998 | 1999 | 2000 | 2001 | 2002 | Lærusáttmálar tilsamans 1998/-2002 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bakari | 6 | 6 | 13 | 7 | 10 | **42** |
| Bilmálari | 0 | 1 | 3 | 2 | 1 | **7** |
| Bilmekanikari | 8 | 14 | 15 | 13 | 9 | **59** |
| Bilplátusmiður | 3 | 0 | 4 | 1 | 1 | **9** |
| Blómuprýði | 1 | 1 | 1 | 5 | 1 | **9** |
| Bygningsmálari | 0 | 2 | 0 | 3 | 2 | **7** |
| Bygningssnikkari | 10 | 5 | 10 | 12 | 14 | **51** |
| Datamekanikari | 2 | 1 | 5 | 4 | 0 | **12** |
| Elektrikari | 11 | 18 | 33 | 27 | 30 | **119** |
| Elektronikktøkningur | 2 | 0 | 3 | 5 | 2 | **12** |
| Grafikari | 4 | 4 | 1 | 1 | 1 | **11** |
| Hárfríðkari | 11 | 15 | 9 | 7 | 21 | **63** |
| HVS-montørur | 0 | 1 | 1 | 4 | 0 | **6** |
| Kokkur | 2 | 4 | 4 | 1 | 2 | **13** |
| Kondittari | 4 | 2 | 2 | 3 | 2 | **13** |
| Lastbilamekanikari | 3 | 4 | 2 | 1 | 2 | **12** |
| Maskinsmiður | 33 | 41 | 49 | 46 | 42 | **211** |
| Maskinsnikkari | 2 | 0 | 2 | 2 | 0 | **6** |
| Miðlagrafikari | 0 | 0 | 2 | 4 | 5 | **11** |
| Múrari | 3 | 0 | 2 | 1 | 3 | **9** |
| Plátu- og konstruktiónssmiður | 0 | 0 | 6 | 0 | 2 | **8** |
| Prentari | 2 | 0 | 1 | 2 | 0 | **5** |
| Radiomekanikari | 2 | 4 | 1 | 3 | 2 | **12** |
| Rørsmiður | 2 | 3 | 5 | 6 | 3 | **19** |
| Slaktari | 2 | 1 | 3 | 1 | 0 | **7** |
| Stálskipasmiður | 4 | 4 | 1 | 1 | 0 | **10** |
| Timburmaður | 17 | 30 | 24 | 46 | 46 | **163** |
| Træskipasmiður | 1 | 1 | 0 | 2 | 1 | **5** |
| Tænari | 1 | 1 | 5 | 4 | 2 | **13** |
| Onnur handverk | **6** | **10** | **12** | **16** | **9** | **53** |
| Lærusáttmálar tilsamans tíðarskeiðið 1998-2002 .... | **142** | **173** | **219** | **230** | **213** | **977** |

Handverkarin nr.6 21/03/03 21:50 Page 31 (Black plate)



… framhald frá síðu 13

Hoyvík, Hvítanes, Norðadalur og Syðradalur, tá kommunalt kallaðust. Av sonnum eitt lokalpolitiskt klútateppi, sum serligt hegni kravdist til at umsita.

Men sum bygdaráðsformaður, saman við góðum monnum, lá væl fyri hesi árini at stjórna hesi óvanliga spjøddu kommunu. So væl, at Petur varð afturvaldur seinna skeiðið við framúr stórum atkvøðutali. Hetta vóru árini, tá bæði Argjar og Hoyvík tóku dik á seg at vaksa frá smáum bygdum til býarforstaðir við nútíðar tænastustøði og bygnaði, ið krevst, og tá tankin búnaðist at broyta kommunumørkini til tað, ið vit hava í dag.

Sum tað sømir seg einum samfelagsins tænara, ið tekur upp á seg eina borgaraskyldu, tá heitt verður á hann, røkti Petur líka samvitskufult sum alt annað, hann tókst við, bygdaráðsformans og skrivarastarvið á Argjum, helst fyri lítla og onga samsýning, til hann við tí neyðugu sálarstyrkini vísti sítt lítillætni við at leggja frá sær, hóast hann var biðin um at halda fram.

Petur var bygdaráðsformaður í Tórshavnar uttanbíggja kommunu árini 1967-75.

Petur Midjord andaðist 11. januar 1992.



*Petur Midjord og konan Mona avmyndaði fimti ára føðingardag teirra í 1972.*

*Einans 14 dagar eru ímillum føðingardagar teirra, so fimti ára føðingardagarnar hildu tey sama dag.*



*Jaspur Midjord og Alfred Kristoffersen hava báðir verið drúgt áramál í stjórn felagsins.*

*Jaspur (høgrumegin á myndini) er bróður Petur Midjord, føddur 4. august 1924. Alf er føddur 21. mai 1926, hann er útbúgving kondittari, og hevur í ein mansaldur starvast hjá Frants Restorff í Havn.*

Handverkarin nr.6  21/03/03  21:51  Page 32    (Cyan plate)




TRYGGINGARFELAGIÐ
FØROYAR




TRYGGINGARFELAGIÐ
FØROYAR

Handverkarin nr.6 21/03/03 21:52 Page 32 (Yellow plate)



Handverkarin nr.6 21/03/03 21:52 Page 32 (Black plate)

VANLUKKUTRYGGINGIN




SANSIR TEL 355 355

Eydnan er at hava ein at fylgjast við. Ein frítíðartrygging gongur í tínum fótafetum og verjir ímóti, at tú og tíni kæru koma fíggjarliga illa fyri av eini vanlukku.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

Kongabrúgvin, Postboks 329, FO-110 Tórshavn, Tel 345600, Fax 345601, tf@trygging.fo, www.trygging.fo